# Heiti stólurin



**Navn: Maibritt P. Bærentsen**
**Født: 23. mars 1975**
**Starv: Grafikari á Kvinnu**

***Hvat lívsstarv hevði tú valt, um tú ikki valdi sum tú valdi?***
???
***Hvat hevði tú gjørt, um tú vann eina miljón?***
Goldið lánið niður, keypt Ken einar nýggjar tuflur og hygga mær fyri rest
***Hvat gert tú, tá tú slært teg leysan?***
Brúki pengar
***Er nakað tú elskar at øsa teg upp um?***
Parkeringsviðurskiftir í Fuglafirði
***Hvat er eitt gott lív?***
At verða nøgdur
***Hvar keypir tú, FK ella Haraldsen?***
Eg keypi bæði í FK og Haraldsen. Tað kemur ann uppá hvat eg skal keypa
***Hvat er tín lívrættur?***
Ræst kjøt
***Hvat er tað ringasta, tú kanst fáa at eta?***
Eti ikki um eg fái servera livur og hjarta
***Nær keypti tú seinast tær sjálvum eitt plagg?***
Eg keypti mær einar kovboybuksir í Kato
***Hvør í Fuglafirðið hevur x-factor?***
???
***Hvat er størsta hóttanin móti heimsfriðinum?***
Ikki at kunna fyrigeva
***Nær vart tú í kirkju ella á møti seinast?***
Hmmmm.... ???
***Hvørji eru Føroya bestu kvinnuligu og mannligu sangarar?***
Eivør og Jens Marni
***Hvat metir tú vera tína størstu styrki?***
Sjálvdisiplin
***Tín størsti veikleiki?***
Tosi ov nógv / brótið onnur av tá ið tey tosa
***Hevur tú nakra last, tú vilt sleppa undan?***
Tosa ov nógv / brótað onnur av tá ið tey tosa
***Hvat er tín størsti dreymur?***
At skræða nakrar mánaðir úr kalendaranum og fari út í verðina
***Hvønn tónleik spælir tú, tá tú veruliga hugnar tær?***
Michael Bublé og John Mayer

***Hvat er stuttligasta menniskja tú kennir?***
Puha... haldi at tað eru so nógv stuttlig menniskju. Kann ikki velja bara ein

***Og hvat er tað keðiligasta?***
Haldi ikki at eg kenni nakað keðiligt menniskja. Men eg havi tað best saman við fólki sum tosa nógv.



**Navn: Fritleif í Lambanum**
**Føddur: 13/04-1986**
**Starv: á Proviantdeildini hjá Haraldsen**

***Hvat lívsstarv hevði tú valt, um tú ikki valdi sum tú valdi?***
Eg havi ikki valt mítt lívsstarv enn, royni at finna útav tí í løtuni hvat tað skal verða
***Hvat hevði tú gjørt, um tú vann eina miljón?***
Tað hevði eg nokk fyri tað fyrsta feira orduliga, ferðast við damuni og dótturini, og sett av til eini hús
***Hvat gert tú, tá tú slært teg leysan?***
Tá fari eg í býin! Tað er sjálvdan man fær loyvi til tað tá man spælur fótbólt, so tá man sleppur er tað við maner
***Er nakað tú elskar at øsa teg upp um?***
Fólk sum man merkir á, at tey hata sítt arbeiði
***Hvat er eitt gott lív!***
At hava ein maka og familju man er góður við, og sum er góð við ein sjálvan. Tað er tað viktigasta, so kemur restin nokk
***Hvar keypir tú, FK ella Haraldsen?***
hjá Haraldsen sjálvandi ;)
***Hvat er tín lívrættur?***
Tað er so nógv sum eg dámi væl, men ræst kjøt er kanska tað besta. Bassasa lívrættur er karrybollar..hahahaha
***Hvat er tað ringasta, tú kanst fáa at eta?***
Lasagna, eg HATI lasagnu.
***Nær keypti tú seinast tær sjálvum eitt plagg?***
Eg keypti mær einaferð eina manchester blus tá eg gekk í 7 flokki, nei eg veit ikki, eg keypi ikki serliga nógv klæðir, tað ordnar daman
***Hvør í Fuglafirði hevur x-factor?***
Trúgvi Nesá
***Hvat er størsta hóttanin móti heimsfriðinum?***
Religión
***Nær vart tú í kirkju ella á møti seinast?***
á Jólum
***Hvørji eru Føroya bestu kvinnuligu og mannligu sangarar?***
Eivør Pállsdóttir og Niels Arge Gallan :)
***Hvat metir tú vera tína størstu styrki?***
Eg havi sterkan vilja
***Tín størsti veikleiki?***
Eg eri kanskska for illsintur viðhvørt
***Hevur tú nakra last, tú vilt sleppa undan?***
Eg bæði royki og drekki, men nei, tað havi eg ikki
***Hvat er tín størsti dreymur?***
At eg og Trúgvi høvdu skorað mál fyri ÍF
***Hvønn tónleik spælir tú, tá tú veruliga hugnar tær?***
Eg spæli ikki tónleik tá eg hugni mær. Brúki mest tónleik áðrenn dyst, og tá er tað 200 ella Rammstein
***Hvat er stuttligasta menniskja tú kennir?***
Har er tætt ímillum Hans Atla Petersen og Eyðun Ryggshamar. Mær dámar væl fólk sum eru stuttlig, uttan at hava brúk fyri at gera gjøldur burturúr onkrum øðrum.
***Og hvat er tað keðiligasta?***
Fólk sum mugu brúka onkran annan sum skotskivu, fyri at upphevja seg sjálvan.



**Navn: Lena Lambaa**
**Føddur: 1980**
**Starv: sjúkrarøktarfrøðingur**

***Hvat lívsstarv hevði tú valt, um tú ikki valdi sum tú valdi?***
- dugi ikki at ímynda mær annað starv, men so skuldi tað veri søgufrøðingur.
***Hvat hevði tú gjørt, um tú vann eina miljón?***
- givið mammu og babba eitt sindur og reist verðina runt fyri rest.
***Hvat gert tú, tá tú slært teg leysan?***
- dansi salsa.
***Er nakað tú elskar at øsa teg upp um?***
- at fólk smaska tá tey eta.
***Hvat er eitt gott lív!***
- mítt lív.
***Hvar keypir tú, FK ella Haraldsen?***
- Haraldsen, sjálvandi.
***Hvat er tín lívrættur?***
- skerpikjøt á mammusa heimabakað rugbreyð.
***Hvat er tað ringasta, tú kanst fáa at eta?***
- reyð pylsa.
***Nær keypti tú seinast tær sjálvum eitt plagg?***
- í gjár.
***Hvør í Fuglafirðið hevur x-factor?***
- Lív hjá presti, hon er so sjarmerandi at lurta eftir.
***Hvat er størsta hóttanin móti heimsfriðinum?***
- mannfólk.
***Nær vart tú í kirkju ella á møti seinast?***
- á jólum.
***Hvørji eru Føroya bestu kvinnuligu og mannligu sangarar?***
- Eivør og Høgni Lisberg
***Hvat metir tú vera tína størstu styrki?***
- viljin
***Tín størsti veikleiki?***
- creme egg
***Hevur tú nakra last, tú vilt sleppa undan?***
- mínum alski til creme egg.
***Hvat er tín størsti dreymur?***
- at dansa ein dans við Ricky Martin.
***Hvønn tónleik spælir tú, tá tú veruliga hugnar tær?***
- í løtuni er tað salsatónleikur.
***Hvat er stuttligasta menniskja tú kennir?***
- skótin í Bød
***Og hvat er tað keðiligasta?***
- havi ikki møtt nøkrum sum eg vil kalla keðiligt. Hevði heldur ikki tora at sagt hvør, um so var.